## Minningarorð um mammu okkara

# Miu Godtfred

**28.07.1914 – 30.03.2009**



"Hevur tú fingið nakað at eta ... døgurða ... náttura". Hetta vóru at kalla síðstu orðini frá mammu – orð, sum vit so ofta høvdu hoyrt áður. Hon hevði eitt ómetaliga stórt umhugsni og stóra umsorgan fyri okkum og øllum øðrum. Eftir stutta sjúkralegu andaðist hon 30. mars 2009 – 94 ára gomul.

Mia, sum var dóttir Ingu fødd Jacobsen og Gunnar Danielsen í Vági, var fødd 28. juli 1914. Árið eftir, at hon var fødd, fluttu foreldrini úr Søldarfirði suður til Vágs. Tá var stórt og vaksandi virksemi í Vági, og Gunnar fekk skiparakjans í reiðaravirkinum hjá J. Dahl á Gørðunum. Gunnar var sonur D. J. Danielsen – gamla sýslumann – úr Søldarfiri. Sostatt var hann beiggi Victor Danielsen, og syskinabarn við menn sum Dollan – missionerin og Magnus á Kamarinum, og pápabeiggi hansara var C. C. Danielsen postmeistari og sparikassastjóri. Inga var úr Niðaragerið í Søldarfirði. Pápi Ingu – Jóhan Dávur – og pápabeiggjarnir vóru hegnismenn til handverk, og vóru m.a. við til at byggja Vágs kirkju. Onkur av teimum flutti til Vágs at búgva og húsini hjá Gunnar og Ingu stóðu klár at flyta inn í, tá ið tey fluttu suður. Mamma Ingu var Sunneva Maria fødd Kjærbo úr Sumba, sum Mia var uppkallað eftir, og Gunnar hevði mangar raskar sumbingar við sær til skips. Heimið stóð altíð opið fyri teimum, og har komu mong fólk á gátt.

Mia var næstelst av 7 systkjum og hevði ein góðan og tryggan barndóm í heiminum í hugnaliga umhvørvinum á Skálabø saman við Lenu, Gunnari, Trúgva, Eigil, Ingolf og Elmari, sum doyði sum lítil smádrongur, og hon helt, at tað var í so langt millum húsini í Tippinum, tá ið hon saman við Andrew fluttu út hagar. Miu vantaði hvørki hands- ella andsevni, og sum stór smágenta gekk hon út at hjálpa til í ymiskum húsum – serliga við at røra kakur. Tá vóru jú eingir el-pískarar ella rørumaskinur. Eftir loknan skúla gekk Mia við posti. Tær báðar – hon og vinkonan Ruth Smith – býttu bygdina millum sín. Seinni fór hon at arbeiða í handlinum hjá Jaspur Hjelm á Løghamri til hon fór á húsarhaldsskúla í Keypmannahavn. Haðani fór hon at tæna hjá kenda bakarameistaranum og kongaliga hofleverandørinum van Hauen, meðan Andrew gjørdi seg lidnan við skipsføraraskúlan.

Komin aftur til Vágs giftist hon Andrew Godtfred – Andrew hjá Diasi. Tey bygdu sær hús í Tippinum og búðu har næstu 30 árini. Tey fingu 4 børn – Andrew, Gunnvør, Bergur og Bogi. Andrew førdi skip undir øllum krígnum og hevði heilar 650 dagar á sjónum í hesi vandatíð. Tá segði tú farvæl við stórum møguleika fyri, at tað var seinastu ferð, tit sóðust. Hetta sleit nervarnar og ávirkaði huglagið. Seinni fór hann í land og var stjóri á hvalastøðini í Lobra og var umboðsmaður fyri oljusøluna hjá Shell í Vági.

Bæði komu tey frá opnum heimum við stórum gestablídni, og hetta kom at seta dám á heimið. Andrew dugdi enskt mál, og undir krígnum høvdu tey stundum enskar yvirmenn búgvandi, og í 50'unum og 60'unum var sjáldan vika, at ikki skotskir ella norskir fiskimenn vóru gestir í húsinum. Andrew fór altíð oman á keiðina at bjóða teimum heim og/ella á møti í Bethel. Hetta kundi hann gera, tí hann visti, at hann í Miu hevði fullan stuðul heima. So var prát, sangur, tónleikur og gott lag.

Hesa tíðina høvdu tey avgreiðsluna hjá Shell í Vági, og Mia hjálpti til í virkinum. Arbeiðs- og ábyrgdaruppbýtið var natúrliga kynsuppbýtt og siðbundi fyri tíðina, so Mia mest hevði ábyrgd innanveggja, meðan Andrew mest hevði ábyrgd uttanveggja, men tað sýntist sum um, at tey vildu kappast at geva hinum partinum tað besta og tæna hvørjum øðrum á bestan hátt. Tað sást aftur á húsunum og á umhvørvinum inni og úti, tí snøggari hús var neyvan í bygdini hesa tíðina. Mia man vera besta prógvið um, at aftan fyri ein góðan mann, stendur ein góð kona.

Tá ið Gunnar var farin, og Inga, systkinini hjá Miu og børnini við vóru flutt heimaní frá, tóku Mia og Andrew teltpelarnar upp og fóru til Havnar at búgva. Tey keyptu hús ovast í J. Paturssonargøtu og búðu har næstu 30 árini. Andrew fór aftur til skips og var eitt tíðarskeið tollari, og Mia fór at arbeiða á Hafnia og nøkur ár seinni á nýggju Frímerkjadeildina. Har var hon, til hon gavst fyri aldur. Tey nutu síðan eitt virkið eftirlønarlív. Andrew var vaktarmaður á Skipasmiðjuni og hevði sín síðsta arbeiðsdag 79 ára gamal, og harafturat róði hann ofta út øll árini til hann gjørdist lamin. Mia var um hann tey nærum tíggju næstu árini – eins og hon áður hevði verið um pápa sín – til tey um 90 ára aldur sum tey fyrstu fluttu á Tjarnargarð. Andrew andaðist 16. februar í 2005, og Mia helt í sorgblídni fyri, at hann kundi havt bíða við at fara, til tey høvdu hildið krúndiamantbrúdleyp í november sama ár.

Mia hoyrdi til tey stillu í landinum, og gjørdi einki hóvasták burtur úr sær sjálvari. Hinvegin setti hon sær sjálvari ein høgan standard fyri alt, ið hon gjørdi, og hennara uppmerksemi og gestablídni er víðagitið, og mangur hevur sitið sera væl inni hjá teimum. Mia var um gestirnar við mati og drekka og Andrew við práti – og øll hugnaðu sær og vóru glað. Mia hevði gingið á húsarhaldsskúla og legði doyin á at gera dygdargóðan og vælsmakkandi mat, og hon elskaði at geva húsfólki og gestum tað besta, ið húsið kundið bjóða. Hon var eisini ein frálíkur bakari. Hon hevði til frægd at lesa bøkur og bløð um mat, men tá ið hon fór til verka, broytti og tillagaði hon uppskriftirnar, sum tað hóvaði henni. Ofta nýtti hon als onga uppskrift, men komponeraði sjálv sum ein annar virtuosur.

Mia hevði eitt stórt hjarta fyri øðrum – ikki minst fyri teimum veiku og smáu í samfelagnum. Hon hevði altíð eina fína kenslu av, hvør var í farvatninum, sum hon kundi bjóða inn, og hvør ið hevði tørv á onkrum, har ið hon kundi leggja okkurt til. Hon hjálpti og stuðlaði samkomum og felagsskapum við tí, ið hon dugdi at gera og hevði møguleika fyri at hjálpa til við. Hon hevði lítlan tørv á uttan orsøk at skifta út lutir og keypa nýtt, so mangar gávur fóru óútpakkaðar til onnur, ið hon helt høvdu meira brúk fyri teimum.

Mia var løtt av lyndi, og henni dámdi væl læ ttan sang og tónleik. Mia hevði avgjørdar meiningar um mangt og hvat og segði, hvat ið hon helt, men hon dugdi eisini at lurta eftir øðrum og virða meiningarnar hjá hinum. Hon las nógv og fylgdi til tað síðsta væl við í fjølmiðlunum og í viðurskiftum, sum hon hevði áhuga fyri.

Nú er Mia ikki longur, og ættarliðið, ið hon hoyrdi til, er við at doyggja út. Við henni og teimum er ein partur av føroyskum siðaarvi og mentan við at fara í søguna. Mia var ein av teimum, ið legði til í familjuni, nærumhvørvinum og í samfelagnum. Sjálvt um tað fyri onnur og samfelagið sum heild ikki tykist um meira enn ein lítil dropi, so var tað fyri okkum, ið nutu gott av hennara avriki, sum eitt heilt hav.

Ærað veri minnið um mammu mína.

**Bergur**

# Honda til HB

Bilasølan Nordcar, sum selur bilmerkini BMW, Fiat og Mini, og bilasølan Norðbil, sum selur bilmerkini Hyundai, Skoda og Honda hava gjørt ein sponsorsáttmála við Havnar Bóltfelag, um at teir fáa ein spildurnýggjan Honda Accord árgang 2010 at koyra í.




*Á myndini eru f.v.: Andrew av Fløtum frá HB, Jens Petur Jensen, stjóri á bilasøluni Nordcar, Kristján Guðmundsson venjari hjá HB og Birgir Dam Jacobsen, stjóri á Norðbil*

*Mynd: Jens Kristian Vang*